Oyggjablaðið


# TEIR BÍTA Á

## Hemarar um summarið

*Tey seinastu árini hevur Magni Blástein tikið stig til ta serligu hemarakappingina í Føroyum. Henda kappingin hevur bert verið í ávísa tíð á vetri, tá ein hevur hildið at mest var til at hemara kring oyggjarnar. Men Magni hevur nú funnið fram til, at møguleiki er eisini at fiska hemara um summarið á einum ávísum staði. Hetta tilboðið fer eisini at standa útlendsku stuttleikafiskarunum í boði, nú teir í rættiliga stórum tali fara at vitja oyggjar okkara í summar. Sum skilst er ætlanin somuleiðis at bjóða øllum teimum føroysku hemarafiskarunum til eitt tiltak, saman við útlendskum gestum, ein leygardag í juli mánaði.*

**VESTMANNA – Eg kann so ikki siga annað enn, at arbeiðið mítt at reklamera uttanlands hevur givið úrslit, sigur Magni Blástein. Aftur í ár fær hann vitjan av týskarum, írum og póllendingum sum bert hava havfiskiskap í huga. – Tað er líkt til, at teimum eisini dáma hetta slagið av fiskiskapi í føroyskum farvatni**

Snorri Brend

Veðrið er av tí allarbesta hósdagin í farnu viku. Sólin er frammi viðhvørt, men tað er kuldi í luftini.

Umborð á bátinum Blásteini er hann farin til arbeiðis. Tað ræður í fyrsta umfari um at hava bátin lidnan til stevnuna um vikuskiftið. Men í øðrum lagi liggur eitt spennandi summar fyri framman.

einaferð stendur fyri framman í summar. Í roynd og veru skal hann til »roynd« um ikki so langa tíð, tí fleiri bólkar úr fleiri hava longu tikið av tilboðum hansara.

– Fyri teir er tað ikki ein spurningur um kostnað. Teir koma óansæð prísin, tí vit hava nakað serstakt at bjóða teimum, sigur Magni Blástein við einum brosi.

Í ár væntar hann at hava hesar

## Fyri teir er tað ikki ein spurningur um kostnað. Teir koma óansæð prísin

spentur á málinum. - Talan er um ein bólk av týskarum, sum koma 1. juni og steðga her í eina slaka viku.

## Sum tú sært er hetta eitt rættiliga snævurt fólkaslag

– Ja, tá ein hevur ein slíkan træbát, er neyðugt at mála hann eina ferð um árið, slær Magni Blástein fast.

Hann er tó fult greiður um, at alt viðlíkahaldið umborð verður ikki liðugt til sjálva Bátastevnuna. Ætlanin er kortini, at Blásteinur verður við, tá bátarnir koma siglandi inn á Vestmanna.

Hetta verður líkasum ein venjing ella upphiting til ta stóru uppgávuna sum enn stuttleikafiskararnar í samanlagt fimm vikur.

### Hemarir

Magni Blástein hevur tey seinnu árini rættiliga gjørt vart við seg innan ferðavinnu og havfisking, við serligum áhuga fyri hemaraveiðu og hemarakapping kring oyggjarnar.

Henda kappingin fer fram á hávetri, og hevur verið væl móttikin av føroyingum. Men um summarið ger Magni seg út við tilboðum til føroyingar og kanska einamest útlendingar.

Her kunnu nevniliga stuttleikafiskarar kring allan heimin koma til Vestmanna fyri at fáa sær eina serstaka uppliving við tráðu í hond.

Hetta er sætta árið at útlendingar hava henda møguleikan, og fyri teir hevur tað einki at siga, hvør kostnaðurin er. Fyri teir eru Føroyar og Vestmanna eitt so sjáldsamt tilboð, at teir fegnir ofra bæði tíð og pening uppá tað.

– Ja, teir fyrstu koma longu um slakar tríggjar vikur, sigur Magni, ikki sørt

### Fjórðu ferð

Einki kemur av ongum. Aftanfyri tilboðið hjá Magna Blástein liggur eitt stórt og miðvíst fyrireikingararbeiði, bæði heima í Føroyum og ikki minst í øðrum londum.

– Eg havi brúkt nógva orku við at at senda tilfar til tíðarrit, portalar hjá stuttleikafiskarum og onnur støð, greiðir Magni frá.

Nú fær hann úrslit av stríðnum, tí tað er ikki frítt, at útlendingar hava bitið á tilboð hansara. Talan er ikki bert um týskarar, men higar koma eisini írar, polakkar og danir.

– Eg haldi, at teir eru sera væl nøgdir. Ja, tann eini bólkurin kemur í ár á fjórða sinni, sigur hann við einum brosi.



**VIÐLÍKAHALD**

*Blástein varð bygdur í Noregi í 1963, og hevði heimstað í Havn undir navninum Tjørnunes. Í 2008 byrjaði Magni Blástein at rigga hann til ferðavinnu, og í fjør var fyrstu ferð at hesin møguleikin var til staðar. – Tað er altíð okkurt at takast við, tá ein hevur bát, staðfestir hann*

Mynd: Jens Kristian Vang